# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Minningarorð um Hilbert Martin Blástein

**Føddur 16.11.1979 – Andaðist 12.11.2009**

Vit hava mist eina fyrimynd. Sum nærmasti beiggi, hava vit fylgst ein stóran part av lívinum. Og eftir siti eg við minnum um lítlabeiggja, sum eina stóra fyrimynd. Løgið at hugsa sær, tí eg havi altíð bilt mær inn at fyrimyndir vóru eldri enn eg.

Á hansara lívsferð, tá hann bleiv maður, og fekk familju og børn; mentist hann nógv. Familjan bleiv hansara eitt og alt, og hansara ferð sum familjumaður bleiv ein ferð yvir friðarlig dýpi. Har dýpi og veldigar víddir eru hav og aftur hav.

Sum unglingi var hann sum unglingar flest. Hann sigldi ofta á sløttum sjógvi, men firdi ikki fyri at leggja seg uppat har tað rak hart, og aldurnar kundu gerast hvassar.

Sum barn, var hann altíð so hjálpsamur, og gjørdi ikki nógv burturúr sær sjálvum. Hann spældi í fjøruni niðanfyri heimið, har var grunt og góður sandur at vassa í. Gekk og leitaði eftir tí, sum kom rekandi av havinum.



Eitt kinesist orðafelli kom aftur og aftur til mín í sorgini "gevst við bønini, og ger tað góða". Og tað er serliga seinna helvt av hesum orðatakið, sum eyðkendi hann. Hann royndi altíð at gera tað góða, og ikki minst geva eina hjálpandi hond. Hoyrdi einaferð ein svág siga skemtandi, at hann kundi ikki fara framvið við trillibøruni; so kom Hilbert út við spakanum í hond.

Ein klókur maður segði einaferð, at tað krevst ein heil bygd at uppala eitt barn. Og á Viðareiði eru fyritreytirnar góðar við tí samanhaldi, sum er í bygdini. Vit sum komu úr Vestmanna, merktu at øll bygdin var saman um jarðarferð og ervið. Tað skulu øll á Viðareiði eiga stóra takk fyri.

Og at enda vilja eg takað til eitt annað kinesist orðafelli, "Bønir broyta ikki veruleikan. Nei, bønir broyta menniskju, og menniskju broyta veruleikan", So mín bøn fer til øll sum hava ábyrgd av okkara bjargingar tilbúgving.

Má Harrin styrkja teg Rannvu og børnini í tíðini frameftir. Eina lítla troyst finna vit í orðunum hjá Jóannes Patursson; "Komi børn mín føvning í, har er trygd úr øllum váða, Harrin best kann forløg ráða".

Hvíl í friði.

**Magni**

## Andlát og jarðarferðir

**Paulina Larsen, fødd Hammer ættað úr Haldarsvík,** búsitandi á Lollandi í Danmark andaðist í heiminum hósdagin, 72 ára gomul.

**Karen Nielsen Odense, fyrrverandi trúboðari á Sandoynni, vanliga nevnd Karin hjá Kurt,** andaðist fríggjadagin. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 14 úr Bykirken, Østergade 57-59, 5000 Odense.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum, sum sýndu samkenslu og stórt hjálpsemi, tá elskaða dama, dóttir, ommudóttir, systir og mostir okkara

**Margretha Haraldsdóttir Jensen**
Sandi

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri vitjanir, heilsanir, blómur, kransar og pening til upplýsing um CTD.
Tøkk fyri góð orð í kapellinum og kirkjuni.
Tøkk til sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk tit, ið bakaðu og hjálptu okkum í heiminum og við ervinum.
Tøkk øll tit mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Sammi, Harald, Fridrikka, Tórgerð, Hjørdis og Katrin**

# MERKISDAGAR

**Diamantbrúðleyp**
Fríggjadagin 4. des. hava Kirsten og Daniel Næs, Hvalba, diamantbrúðleyp. Tey, sum vilja heilsa uppá diamantbrúðarparið eru vælkomin hjá Monu og Eliesar, Toftavegur 15, frá kl. 14-19.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 5. des. kunnu hjúnini Edith og Páll Klettskarð, í Haraldssundi, halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Haraldssundi í millum kl. 12 og 17. Tey, ið vilja gleðast saman við okkum, eru hjartaliga vælkomin.

**Silvurbrúdleyp**
Sunnudagin 18. okt. høvdu Birgit og Hanus Hansen, klaksvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 12. des. kl. 19 í Badmintonhøllini í klaksvík. Tey sum ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 227479 ella 455592. Ella við at skriva til: bsh@post.olivant.fo áðrenn 3. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 1. des. hava hjúnini Andra og Hjørleif Zachariassen, Streymnes, silvurbrúdleyp. Tey verða burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá í tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

**Brúdleyp**
Fríggjadagin 4. des. kl. 10 giftast í Sørvágs kirkju, Tórgun Jørleifsdøttur úr Sørvági og Hans Petur Lamhauge av Skála. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum Libanon í Sørvági frá 13-17, har øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. januar 2010 giftast í Sjóvar kirkju Anna Petersen av Strondum og Pauli G. Hansen av Skála. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl 18. Tey, ið ynskja at gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf 591486/447257 (Anna) ella 594323/441323 (Pauli) innan 15.desembur.

## Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu, tá mamma, omma og langomma okra

**Magdalena Ellendersen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Takk til Suðuroyar Ellis- og Røktarheim, og tykkum, sum fylgdu henni til hvíldar.
Takk fyri gávur, blómur, kransar og aðra hjálp, ið veitt varð.

*Heilsan*
**Jensa, Sonny og Demmus**

## Dagurin

**1. desember. Arnaldur.** Er eitt av teim elstu nøvnunum í halgramanna tali, tað er eitt sindur tvørligt at fáa skil á, hvør hesin Arnaldur hevur verið. Fleiri við sama navni verða nevndir, og teir flestu halda, at her verður sipað til ein franciskanaramunk, sum fór til Kina í 1303 sum trúboðari. Navnið er gamalt týskt, sett saman av arn, sum merkir ørn og wald, ið merkir tað sama sum føroyska orðið vald ella hersi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

